# Nú skulu vit hava at vita hvat ið ein føroyingur er

**Formenninir í teimum politisku flokkunum fara nú at viðgerða, hvussu tjóðskaparligu støðan hjá føroyingum skal staðfestast í nýggju grundlógini**



GRUNDLÓGIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú skulu vit hava at vita, hvat ið ein føroyingur er.

Hetta er nevniliga ikki so einfalt, sum tað ljóðar.

Ein nevnd undir Løgtinginum hevur nú í fleiri ár arbeitt við spurninginum um at orða eina nýggja, føroyska grundlóg.

Í eini nýggjari grundlóg skal tað eisini staðfestast, hvat ein føroyingur er.

Og júst hesin spurningurin kann vísa seg at verða ein trupul knútur at loysa.

Hann kann enntá vísa seg at gerast so trupul, at hann rætt og slætt fer at beina fyri grundlógarnevndindini.

Javnaðarflokkurin hevur kravt at fáa spurningin um tjóðskaparliga støðu føroyinga í nýggju grundlógini avgreiddan sum skjótast.

Fæst ikki semja um tað, sær flokkurin onga meining í at halda fram í arbeiðnum í grundlógarnevndini.

Somuleiðis umhugsar sambandsflokkurin sína støðu í nevndini

Hvussu tað so endar við grundlógarnevndini, fáa vit at vita um ikki so langa tíð. Nú er avgjørt, at formenninir fyri teir politisku flokkarnar skulu seta seg saman at viðgera tjóðskaparliga spurningin.

Tað arbeiðið fara teir undir beinanvegin.

### Onki vert

Summir politikarar haldam

*- Høgni Hoydal sigur, at tað, vit skulu viðgerða er, hvørji rættindi, vit skulu hava sum eitt fólk ella ein tjóð og, hvør støða okkara sum eitt land er og tað væntar ikki at ósemja verður um*

at tað hevur avgerðandi týdning at finna semju um tjóðskaparliga spurningin. Tá ið spurningurin varð umrøddur á Løgtingið herfyri, segði løgmaður, at tað hevur stóran týdning at finna eina stóra semju um hetta.

Í tí sambandi helt Anfinn Kallsberg at fáat tey mest víðgongdu sjónarmiðini at mýgkjast, hevði tað hevði verið eitt langt stig á vegnum.

- Ein stór semja krevur, at flokkarnir hava virðing fyri sjónarmiðunum hjá hvørjum øðrum.

Hinvegin helt løgmaður, at fáa vit ikki eina stóra semju um tjóðskaparliga spurningin, er tað eisini ivingarsamt um vit fáa eitt úrslit yvirhøvur.

- Eg haldi, at í einum so týdningarmiklum arbeiði sum hesum, er tað týdningarmikið at finna eina stóra semju, annars er tað onki vert, segði Løgmaður.

### Gleðir seg at staðfesta

Høgni Hoydal sigur, at vit eiga at gera alt, fyri at finna eina stóra semju.

Hann sigur eisini samgongan hevur gjørt tað, hon kann fyri at fáa eina stóra semju, tí eru allir flokkar við í arbeiðnum.

- Var ætlanin at gera ein grundlóg, uttan at at geva henni tað viðgerð, hon hevur fingið, hevði ongin orsøk verið til at fingið allar flokkar við í arbeiðið.

Men hann sigur, at miseydnast tað at finna eina stóra semju, er arbeiðið í grundlógarnevndini á ongan hátt.

- Tað arbeiðið, sum er gjørt, hevur ómetaligan stóran týdning, tí vit hava viðgjørt ein hóp av málum, sum hava við viðurskiftini hjá føroyingum at gera, bæði mannarættindini, rættindini til at troyta tilfeingið, vit hava, hvussu Løgtingið og landsstýrið skulu skipast, hvussu landið skal stýrast fíggjarliga, umframt nógvar aðrar spurningar.

Hvussu tjóðskaparligi parturin í grundlógararbeiðnum skal orðast, vil Høgni Hoydal ikki gera viðmerkingar til fyri ikki at forða fyri eini loysn.

Hann heldur, at grundlógarráðstevnan ruddaði nakrar misskiljingar av vegnum. Men hann ivast í, um talan yvirhøvur er talan um nakra ósemju. Hann heldur eisini, at grundlógarráðstevnan vísti, at tað ber til at fáa eina semju.

- Eru vit ósamd um, hvussu rættindini hjá føroyingum skal vera? Eru vit so ósamd um tað, at vit ikki fáa tað fest niður í eina grundleggjandi lóg?

Høgni Hoydal sigur, at hann gleðir seg til at fáa tann spurningin staðfestan.

- Tað, vit skulu tosa um, er, hvørji rættindi, vit skulu hava sum eitt fólk ella ein tjóð og, hvør støða okkara sum eitt land er. Tað, vit skulu tosa um, er okkara rættindi og okkara rættarstøðu og tað hevur hann góðar vónir um at flokkarnir kunnu semjast um, hóast teir annars standa rættiliga langt frá hvørjum øðrum í tjóðskaparliga spurninginum.

Og hann heldur avgjørt, at skuldi tað kortini miseydnast, hevur viðgerðin undir ongum umstøðum verið burturspilt, tí tað er undir øllum umstøðum gagnligt at fáa eitt kjak um evnið - og so fáa vit undir øllum umstøðum staðfest, akkurát, hvar ósemjurnar eru.

# Lítið mál kann koppa góðari ætlan

**- Tjóðskaparligi spurningurin er bara ein evarska lítil partur av arbeiðnum at gera eina nýggja grundlóg, men kortini kann hann beina fyri øllum arbeiðnum, sigur Jóannes Eidesgaard**

GRUNDLÓGARNEVNDIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Fáa vit ikki eina semju um tjóðskaparliga spurningin, er ongin meining at tosa um restina.

Jóannes Eidesgaard sigur at javnaðarflokkurin hevur eina greiða støðu til framhaldandi arbeiðið í grundlógarnevndini.

Hann sigur, at tað er neyðugt at fáa greiði á, um semja fæst um tað tjóðskaparligu orðingina í grundlógini.

Tí vil hann hava tann spurningin avgreiddan beinanvegin, tí fæst ikki semja um tann spurningin, dugir hann ikki at síggja endamálið í at halda fram yvirhøvur.

Og sum tað sæst í hinari greinini, kemur júst tann spurningurin at standa sína roynd nú.

Sjálvur vónar hann, at tað fer at bera til at finna semju um tjóðskaparliga spurningin.

- Í veruleikanum er hetta bara ein ógvuliga lítil partur av grundlógararbeiðnum. Alt hitt, vit hava viðgjørt í nevndini um viðurskiftini hjá føroyingum, rættindi og skyldur hjá føroyingum, løgtingið og landsstýrið og nógv onnur mál, hevur verið stak, stak áhugavert, og tað er nógv tann størsti parturin av arbeiðnum, sigur Jóannes Eidesgaard

Og hann ivast ikki í, at alt tað fer tað at bera til at finna semju um.

Men eftir stendur so tann tjóðskaparligi spurningurin, sum verður avgerðandi.

- Tað er umráðandi at fáa tann spurningin til viðgerðar sum skjótast og at fáa greiði á, um tað ber til at finna semju ella ikki, tí miseydnast tað, er tað meningsleyst at halda fram yvirhøvur.

Men av tí, at hetta er tann avgerðandi spurningurin, er tað umráðandi, at hann ikki verður skumpaður undan alla tíðina.

- Finna vit ikki semju, er arbeiðið dottið á gólvið. Vit mugu fyri alt í verðini ikki koma í eina støðu, har tað er samgongan, sum atkvøðir eina grundlóg ígjøgnum tingið og andstøðan atkvøðir ímóti. Grundlógin er fyri øll. Hon er grundarlagið undir samfelagnum og tí má hon eisini hava stóra undirtøku.

### Tveir møguleikar

Jóannes Eidesgaard sigur, at formaðurin í grundlógarnevndini hevur skotið upp, at har ósemja er í grundlógarnevndini, skal tað atkvøðast.

- Eg ætli mær ikki at verða niðurstemmaður um tjóðskaparliga spurningin, beint áðrenn vit skulu vera liðug. Tí vil eg hava málið avgreitt so skjótt sum gjørligt, sigur formaður Javnaðarfloksins.

- Sjálvur heldur hann, at

*Grundlógararbeiðið má ikki gerast ein grundlóg fyri samgonguna, tí so er arbeiðið fullkomiliga miseydnað, sigur Jóannes Eidesgaard*

tað eru tveir møguleikar at finna semju um tjóðskaparliga spurningin.

- Tað mest nærliggjandi er at vit staðfesta støðuna, sum hon er. Men so ber eisini til at staðfesta, hvussu farast skal fram, skal støða okkara í ríkinum broytast.

Til dømis sigur formaður javnaðarfloksins, at tað skal standa í grundlógini, at tað eru føroyingar, sum hava fullan avgerðarrætt um, antin vit vilja broyta støðu okkara í ríkinum, ella fara úr ríkinum.

- Hin møguleikin er, at vit gera eina politiska semju um tjóðskaparliga spurningin og um, hvørja leið, vit skulu halda.

Men tað trýr formaður javnaðarfloksins lítið uppá. Hann trýr ikki uppá, at tað ber til at fáa sambandsflokkin og tjóðveldisflokkin at boyggja seg so mikið at tað ber til at orða eina



slíka semju.

Hann heldur somuleiðis, at tað ber ikki til at brúka grundlógina til at orða eina politiska ætlan um at " Føroyar er eitt land við fullveldi" ella onkrum slíkum. Tað ber ikki til, uttan at semja fæst um tað og tað væntar hann avgjørt ikki.



# Grundlógin á gravarbakkanum

**Formaðurin í Grundlógarnevndini harmast, at andstøðuflokkarnir brádliga eru farnir at umhugsa sína støðu í nevndini, ið skal orða eina føroyska grundlóg, evstulóg ella fremstulóg. Verður álvara gjørt av hóttanini, verður talan um eitt serfrøðingauppskot, har sjónarmiðini hjá einum stórum parti av fólkinum ikki eru umboðað, sigur hann**



*Tað hevði verið tápuligt, um stuttskygdur politikkur skal beina fyri arbeiðnum at byggja eitt felags støði undir allari føroyskari løggávu, sigur Jóan Pauli Joensen*

*Mynd: Jens K. Vang*

GRUNDLÓGARNEVND
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Tað hevði verið ein stórur missur fyri eina føroyska grundlóg, um Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin gera álvara av hóttanini at taka seg úr Grundlógarnevndini.

Tað sigur Jóan Pauli Joensen, formaður í Grundlógarnevndini, nú bæði Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin siga seg um umhugsa sína støðu í Grundlógarnevndini.

Tað var í Sosialinum í síðstu viku, at Lisbeth L. Petersen og Jóannes Eidesgaard staðfestu, at teirra flokkar í hesum døgum skulu taka støðu til, um teir vilja halda fram við arbeiðnum í Grundlógarnevndini. Høvið til nýggju støðuna er, at løgmaður á tingsins røðarapalli segði tingmenn bara hava skyldu til at fylgja sínari sannføring. Tað fekk Lisbeth L. Petersen, forkvinnu Sambandsfloksins, at siga, at so mátti flokkurin gera støðuna upp, tí flokkurin ongantíð fer at taka undir við einari føroyskari grundlóg. Danska grundlógin skal eisini vera okkara, staðfesti hon.

Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins, treytaði hinvegin eina víðari luttøku í nevndini við, at ein semja fæst um tann tjóðskaparliga spurningin. Annars tekur flokkurin seg úr arbeiðnum.

### Uttan ávirkan

Jóan Pauli Joensen harmast um nýggju tónarnar frá andstøðuleiðarunum, tí arbeiðið hevur gingið væl í nevndini higartil, heldur hann.

– Eg vóni, at teir hugsa seg um tvær ferðir, áðrenn teir taka seg úr nevndini. Eg trúði, at tað var semja um, at vit skulu gera hetta arbeiðið liðugt. Er tað ikki galdandi, so er okkurt broytt, sigur hann.

Sambært arbeiðssetninginum, skal Grundlógarnevndin gera eitt álit, sum skal vera liðugt á Flaggdegnum komandi ár. Sambært nýggju lógini fyri nevndina, er tað ikki longur ein treyt, at lógin skal vera til eitt føroyskt fullveldi. Heitið á arbeiðnum hjá nevndini, Grundlógarnevnd, er bara ein arbeiðstittul, og tí skilir formaðurin ikki, at andstøðan knappliga kúvendir.

– Tað er einki endaligt. Allir møguleikar standa opnir. Politikkur snýr seg um at hava ávirkan, men seta flokkarnir seg uttanfyri, so fáa teir onga ávirkan á endaliga úrslitið. Sjálvt Sambandsflokkurin hevur sagt, at stýrisskipanin krevur ábøtur, og tað arbeiðið kann eisini gerast í Grundlógarnevndini. Um lógin kemur at eita grundlóg, fremstalóg ella evstalóg er ikki so umráðandi, men tað hevur stóran týdning, at fólkið tekur støðu til hetta, sigur Jóan Pauli Joensen.

### Stuttskygt og tápuligt

Javnaðarflokkurin hevurført fram, at Grundlógarnevndin er eitt upplagt høvi at orða eina tjóðskaparliga semju, sum bróðurparturin av fólkinum kann taka undir við. Lógin kann orðast soleiðis, at til ber at fara til fullveldi ella samveldi alt eftir, hvussu tað gongur frameftir.

Røkist onki fyri, at tann semjan fæst, so hevur Javnaðarflokkurin ikki hug at vera við longur, sigur Jóannes Eidesgaard. Til tað sigur Jóan Pauli Joensen:

– Eingin semja fæst við at loypa frá í úrtíð. Alt tekur sína tíð, og tingini skulu mýkjast, sum Atli Dam plagdi at taka til. Á seinasta fundi samdust vit um, at ein nevnd skal setast, sum skal arbeiða við, hvussu støða Føroya skal vera til onnur lond. Tað skuldi borið til at funnið eina semju, og tað hevði verið tápuligt, um stuttskygdur politikkur skal beina fyri arbeiðnum at byggja eitt felags støði undir allari føroyskari løggávu, sigur Jóan Pauli Joensen.

### Eitt skitsuuppskot

Formaðurin í Grundlógarnevndini sigur annars, at bæði Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin hava gjørt eitt gott arbeiði í nevndini. Og tað hevur eisini stóran týdning at fáa teirra sjónarmið við, nú eitt álit skal orðast.

– Tað álitið, sum verður lagt fram á komandi Flaggdegi, verður ikki ein liðugt orðað grundlóg. Tað náa vit ikki. Tað er heldur eitt skitsuuppskot, sum tað skal bera til hjá fólkinum at ávirka. Tí hevur tað so stóran týdning at sjónarmiðini hjá andstøðuflokkunum eru umboðað, og at tað er pláss fyri fleiri meiningum. Annars missa vit nógv, sigur Jóan Pauli Joensen.

Verður tað, sum tað ljóðar í løtuni, at stóru andstøðuflokkarnir stinga í sekkin, so verður arbeitt víðari kortini, sigur formaðurin í nevndini.

– Vit hava fingið álagt eitt arbeiði, og tað ætla vit sjálvandi at fullføra. Men uttan andstøðuflokkarnar verður helst bara talan um eitt serfrøðingaarbeiði, sigur Jóan Pauli Joensen.

### Fakta

Í grundlógarnevndini sita:

1. Trý umboð fyri hvønn flokk á tingi, sum hevur fýra tingmenn ella fleiri. Eitt umboð fyri teir flokkar, sum hava tríggjar tingmenn ella færri
2. Løgmaður.
3. Landsstýrismaðurin í lógamálum.
4. Átta persónar við hægri samfelagsvísindaligum útbúgvingum.

## Fíggjarlógin framløgd í dag

**Seinnapartin í dag verður løgtingsfíggjarlógin fyri 2004 alment løgd fram. Talan er um sjálvan karmin fyri føroyska samfelagið fyri næsta árið, og stórur spenningur er hesaferð um, hvussu úrslitið fer at síggja út**

FÍGGJARLÓG
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Av Fíggjarmálaráðnum verður upplýst, at Karsten Hansen heldur tíðindafund í dag klokkan 13.30, har høvuðstølini í Løgtingsins fíggjarlóg fyri komandi ár verða løgd fram. Samstundis verður uppskotið til fíggjarlóg handað tingmonnum.

Einaferð í næstu viku fer løgtingið undir at viðgera fíggjarlógina, og tað plagar at taka einar tríggjar dagar. Síðan fer hon í fíggjarnevndina, sum sendir boð til allar hinar nevndirnar um at koma við viðmerkingum. Innan tveir mánaðir skal fíggjarnevndin leggja álit fyri løgtingið, og fíggjarlógin skal so vera endaliga samtykt við triðju viðgerð innan árslok.

Enn eru eingin endalig tøl avdúkað. Heldur ikki, um fíggjarlógin gevur hall ella yvirskot. Greitt er kortini, at Karsten Hansen hevur álagt øllum ráðunum at spara eitt prosent komandi ár. Tíðirnar eru ikki so góðar longur, og tí verður táttað í á fleiri økjum. Samgongan er samd um at halda aftur á íløgusíðuni, men kortini er peningur settur av til viðlikahald av vegakervi, ferjulegur, skúlabygging og ellis- og røktarheim.

Stóri stríðsspurningurin hevur sum skilst verið almennu rakstrarútreiðslurnar, sum eru so nógv vaksnar síðstu árini. Nú vit kunnu vænta sjey rakari ár, skal almenni bygnaðurin eisini klænka, men tað er lættari sagt enn gjørt, m.a. tí lønarhækkingar eru í væntu.